Advokatskrivstovan Fr. Petersensgøta

J. nr. 990606/FP/mj

**V I Ð T Ø K U R**

**fyri grunn**

**Johannesar og Gunhildar í Dalsgarði**

**til frama fyri Fróðskaparsetur Føroya**

**§ 1**

Navn grunnsins er "Grunnur Johannesar og Gunhildar í Dalsgarði til frama fyri Fróðskaparsetur Føroya".

Grunnurin er settur á stovn sambært testamenti eftir Johannes og Gunhild Dalsgaard, Skálavík, og er stovnsfæið arvurin eftir tey bæði.

Heimstaður grunnsins er Tórshavn.

**§ 2**

Endamál grunnsins er at stuðla mentunarligum tiltøkum hjá Fróðskaparsetri Føroya. Mál, ið horva at føroyskum landbúnaði, hava fyrimun.

**§ 3**

Grunnurin verður stjórnaður av eini nevnd við trimum limum, sum eru:

Rektarin á Fróðskaparsetri Føroya og tveir limir valdir av setursráðnum millum fasta vísindastarvsliðið á Fróðskaparsetrinum.

Rektarin er nevndarformaður.

Grunnurin verður teknaður av formanninum saman við einum nevndarlimi.

**§ 4**

Fæ grunnsins skal umsitast á tryggasta hátt, og peningurin skal standa í føroyskum peningastovni til hægstu rentu.

**§ 5**

Nevnd grunnsins ger á hvørjum ári av, hvussu rentan av stovnsfænum verður nýtt. Í undantaksføri kann takast burturav stovnsfænum, sum tó ikki kann fara niðurum kr. 1.000.000,00.

Nevndin kann gera nærri reglur um treytir fyri veitingum úr grunninum.

**§ 6**

Roknskaparár grunnsins er álmanakkaárið. Fyrsta roknskparárið er frá tí, at arvurin er goldin grunninum, til árslok sama ár.

Roknskapurin skal grannskoðast av løggildum grannskoðara.

**§ 7**

Til at broyta viðtøkurnar krevst einmælt nevndarsamtykt. Tó kann nevndin ikki broyta endamál grunnsins.

**§ 8**

Um tíðir og umstøður broytast, soleiðis at endamál grunnsins ikki kann njóta frama, kann ein samd nevnd taka grunnin av.

Ognir grunnsins skulu tá latast til eitthvørt mentunarligt endamál í tráð við § 2 í hesum viðtøkum.

**§ 9**

Hesar viðtøkur eru samtyktar á nevndarfundi tann